SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Sýrialand hevur ábyrgdina. Sýriska stjórnin roynir at myrða øll tey frælsu í Libanon*
*Saad Hariri*

# Ávarar ímóti blóðhevnd



*Pierre Gemayel yngri, sum varð myrdur í Beirut í gjár*

**Fyrrverandi libanski forsetin Amin Gemayel ávarar landsmenn sínar ímóti at hevna morðið á sonin Pierre Gemayel, men vandin fyri vápnaðum samanbresti er stórur**

Tíðindini um, at tann 34 ára gamli Pierre Geamyel var myrdur í útjaðaranum av Beirut í gjár, fóru sum eldur um heimin, og í Libanon fekk morðið tey flestu at minnast tað 15 ára langa borgarakríggið, har Gemayel-ættin hevði ein týðandi leiklut.

Harafturat kemur, at morðið hendir, júst sum vandi er fyri samanbresti millum teirra, sum eru fyri øktum samstarvi við grannan Sýrialand, og tey, sum ikki vilja vita av Sýrialandi.

Pierre Gemayel taldist millum teirra, sum hava sett seg upp ímóti allari sýriskari ávirkan á libanskan politikk. Í gjár bað pápi hansara, fyrrverandi forsetin Amin Gemayel, fólkið sissa seg.

- Vit vilja ikki hava hevnd, segði hann.

### Sýrialand

Fólk, sum sóu tilburðin í útjaðaranum í Beirut, greiddu frá, at ein bilur rendi á bilin, sum ídnaðarmálaráðharrin var í, so hann slapp ongan veg. Um somu tíð leyp ein vápnaður maður út á vegin og skjeyt fleiri skot eftir ráðharranum. Hann varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús, men doyði eina løtu seinni.

Tíðindini um morðið fóru sum eldur um allan heimin, og allastaðni bleiv morðið fordømt. Ein tann fyrsti at fordøma tað var formaðurin í antisýriska bólkinum í libanska tjóðartinginum, Saad Hariri. Hann er sonur fyrrverandi forsætisráðharran Rafiq Hariri, sum varð myrdur saman við umleið 20 øðrum í februar í fjør.

Saad Hariri segði seg ikki vera í iva um, at tað var Sýrialand, sum hevði beint fyri Pierre Geamyel.

- Stjórnin í Damaskus roynir at myrða øll tey frælsu í Libanon, segði Saad Hariri í tjóðartinginum.

Sýriska stjórnin vísti skuldsetingunum aftur við at fordøma morðið sum "eitt andstyggiligt brotsverk".

### Gemayel-ættin

Gemayel-ættin hevur havt stóra ávirkan á libanskan politikk tey seinastu 70 árini og hevur verið virkin á tí kristna høgravonginum.

Abbi Pierre Gemayel, sum eisini æt Pierre, stovnaði í 1939 flokkin Al-Kataib ella Falangistarnar, og hann gjørdist kendur sum tann fremsti talsmaðurin fyri einum frælsum Libanon, sum skuldi rúma øllum libanum.

Seinni og serliga undir borgarakrígnum, sum brast á í 1975, broyttist Al-Kataib til ein sera høgrasinnaðan kristnan flokk, sum fekk sítt egna herlið, og sum framdi fleiri illgerðir eins og hinir partarnir í borgarakrígnum.

Oddamaður fyri herliðinum hjá Al-Kataib var Bashir Gemayel, sum var sonur Pierre Gemayel eldra. Hann bleiv valdur til forseta í august í 1982, meðan Libanon var hersett av Ísrael, men longu ein mánað aftan á valið varð hann myrdur í einari ógvusligari bumbuspreinging. Aftan á morðið bleiv tann eldri bróðurin, Amin Gemayel, valdur til forseta, og hann sat við valdið til 1988.

Pierre Gemayel yngri, sum varð myrdur í gjár, var sonur Amin Gemayel og bróðursonur tann myrda Bashir. Ætlanin var, at hann skuldi halda fram við politikkinum hjá forfedrunum fyri einum frælsum Libanon.

## Morð og morðroyndir

Morðið á Pierre Geamyel í gjár var bara eitt í einari røð av politiskum morðum og morðroyndum í Libanon. Bara tey bæði seinastu árini hava sjey slíkir tilburðir verið.

- 14. januar 2005: Rafik Hariri, forsætisráðharri, verður myrdur í einari bumbuspreinging.
- 2. juni 2005: Antisýriski tíðindamaðurin Samir Kassir doyr í einari bumbuspreinging.
- 21. juni 2005: Fyrrverandi formaðurin í kommunistaflokkinum, George Hawi, verður myrdur.
- 12. juli 2005: Roynt verður at beina fyri varaforsætisráðharranum Elias Murr.
- 25. september 2005: Antisýriska sjónvarpskvinnan May Chidiae missir annan armin og annað beinið av einari bumbu, sum onkur hevur lagt undir bil hennara.
- 12. desember 2005: Antisýriski blaðstjórin Gibran Tueni doyr av einari bilbumbu.
- 21. november 2006: Pierre Gemayel, ídnaðarmálaráðharri og týðandi kristin politikari, verður skotin.

## STUTT SAGT

### Bankamaður skotin

Konstantin Mesjtjeriakov, sum átti ein stóran part av russiska bankanum Spetsetstroibank, varð skotin uttan fyri hús síni í Moskva í gjárkvøldið. Sambært russiska ákæruvaldinum er hann tann triði bankamaðurin, sum er myrdur í Russlandi síðani í august. Ein talsmaður fyri ákæruvaldið segði í gjárkvøldið, at løgreglan hevur onga ábending um, hvør myrdi bankamannin, men at allir møguleikar verða kannaðir.

### Sitið eitt ár

Í dag er eitt ár, síðani Angela Merkel tók við sum týskur samveldiskanslari. Politiskir eygleiðarar í Týsklandi siga, at hetta árið hevur Angela Merkel vunnið sær viðurkenning uttan fyri týska landamarkið, meðan umdømi hennara í sjálvum Týsklandi hevur verið versnandi. Í januar vísti ein meiningakanning, at 85 prosent av týskarunum vóru nøgdir við avrik hennara í kanslaraembætinum, men í síðsta mánað vóru tað bara 55 prosent, sum hildu tað sama. Samstundis er undirtøkan hjá teimum báðum stjórnarflokkunum minkað.

### Altman deyður

Amerikanski filmleikstjórin Robert Altman doyði í gjár. Hann var 81 ára gamal. Robert Altman, sum millum annað er kendur fyri røðina "M.A.S.H." og filmar sum "The Player" og "Short Cuts", varð fleiri ferðir heiðraður fyri síni avrik. Tað eydnaðist honum kortini ongantíð at vinna Oscar-virðirlønina sum besti leikstjóri, hóast hann var innstillaður fleiri ferðir. Tey 55 árini Robert Altman var virkin, leikstjórnaði hann 86 filmum, og hann skrivaði eisini 37 handrit.